Ár 2008, hin 1. apríl

Ár 2008, hin 1. apríl kl. 17:30, hevur Klaksvíkar Býráð býráðsfund við niðanfyri standandi fundarskrá.

22.

2008-17-023 Vegarbeiðir av kontobólki 349 í 2008

Fyri at raðfesta arbeiðini undir "Aðrar vegagerðir" í kontubólki 349 hevur Tekniska Umsiting sett upp yvirlit yvir ymisk arbeiðir, sum eru í gongd og sum ætlanin er at seta í gongd. Hetta m.a. fyri at geva politisku skipanini betur innlit í tað, sum ætlanin eru at fremja í ár – sí skriv frá T.U, dagfest 10. mars 2008. Sum tað framgongur av yvirlitinum, er eitt yvirtrekk uppá kr. 1,6 mill, sum kanska kann fíggjast av útstykkingum á konto 113800 har 5,35 mill. eru avsettar.

Tekniska Nevnd tekur undir við tilmælinum frá TU, dagfest 10. mars 2008

Fíggjarnevndin tekur undir við TN 11.mars 2008

Býráðsins samtykt:

Tilmælið samtykt

23.

2008-17-008 Flyting millum kontur, Íverksetarahúsið

Vísandi til tann avgerandi týdning, sum uppstarturin hjá Íverksetarahúsinum hevur fyri hesa ætlan, og fyri framtíðar íverksetan í Klaksvík og Føroyum, er neyðugt, at játtanin til Íversetarahúsið í fíggjarætlanini fyri 2008 ikki verður skerd í mun til 2007, og mælir borgarstjórin tí til, at játtanin upp á kr. 200.000,- til bygningin við Jústabrekku 1 (konta nr. 290200) verður flutt yvir á játtanina til Grunnin Íverksetarahúsið (kontubólkur nr. 221).

Fíggjarnevndin tekur undir við tilmælinum frá borgarstjóranum, dagfest 21-02-2008.

Býráðsins samtykt:

Rani Nolsøe luttók ikki í viðgerðini, vegna ógegni.

Tilmælið samtykt

24.

2008-17-011 Roknskapur og grannskoðanarfrágreiðing 2007, Mylnuhúsið

Í skrivi, dagfest 07-03-2008 sigur roknskaparleiðarin m.a., at hjálagt er roknskapur og grannskoðanarprotokollin hjá Mylnuhúsinum fyri 2007 og umsókn frá stovninum, dagfest 21. februar 2008, um at fáa kommununa at fíggja meirnýtsluna í 2007: Kr 247.872,-

Av tí at Mylnuhúsið er ein sjálvsognarstovnur, og likviditeturin ikki er góður – kassakreditturin er partar av árinum í minus – verður mælt til at fíggja hallið fyri 2007: Kr 101.315,-. Peningurin verður tikin av játtanini til barnaansing í 2007.

Sosiala Nevnd, 26-03-2008, góðkennir roknskapin og tekur undir við tilmælinum frá roknskaparleiðaranum.

Fíggjarnevndin tekur undir við tilmæli frá Sosialu Nevnd, dagfest 12-03-2008.

Býráðsins samtykt:

Tilmælið samtykt

25.

2008-17-024 Staðfest tap av skuldarum 2007

Sí hjálagt skriv frá roknskaparleiðaranum, dagfest 07-03-2008, har hjálagdur er listi yvir upphæddir fyri 2007, ið umsitingin metir verða endaliga mistar. Roknskaparleiðarin mælir nevndunum til at góðkenna upphæddirnar sum endaliga mistar.

Havnanevndin tekur á fundi tann 11-03-2008 málið til eftirtektar.

Tekniska Nevnd tekur á fundi tann 11-03-2008 undir við tilmælinum frá roknskaparleiðaranum.

Sosiala Nevnd tekur á fundi tann 13-03-2008 undir við Teknisku Nevnd.

Mentanarnevndin tekur á fundi tann 25-03-2008 undir við tilmæli frá roknskaparleiðaranum.

Fíggjarnevndin tekur á fundi tann 26-03-2008 undir við skrivinum frá roknskaparleiðaranum, vísandi til samtyktirnar í HaN 11.03.2008, SoN 13.03.2008, TN 11.03.2008 og MeN 25.03.2008.

Býráðsins samtykt:

Tilmælið samtykt

26.

2008-17-013 Framflyting av óbrúktum játtanum 2007

Sí hjálagt skriv frá býarverkfrøðinginum, dagfest 11-03-2008, har niðurstøðan er hendan:

Samlaða framflytingin er 6,4 mió. kr. Framflytingarnar merkja, at kommunan økir fíggjarætlanina 2008 við 6,4 mió. kr. Kommunan hevur ongan pening til nevndu grunnar, og tí er neyðugt við lántøku. Upplýsast skal eisini, at fyri at kunna brúka grunnarnar, er neyðugt, at hetta verður samtykt av býráðnum 2 ferðir, og at Landsstýrið veður kunnað um avgerðina.

Havnanevndin tekur á fundi 11-03-2008 undir við skrivinum frá umsitingini, dagfest 11.03.2008.

Tekniska Nevnd tekur á fundi 11-03-2008 undir við tilmælinum frá T.U., dagfest 11-03-2008, og at spurningurin um eyka lántøku verður viðgjørdur í hvørjum einstøkum føri. Fíggjarnevndin verður biðin um at geva eina greiða framløgu á býráðsfundinum.

Mentanarnevndin tekur á fundi 25-03-2008 undir við Teknisku Nevnd, 11-03-2008.

Fíggjarnevndin tekur á fundi 26-03-2008 undir við skrivi frá býarverkfrøðinginum, dagfest 11-03-2008, vísandi til samtyktirnar í HaN 11-03-2008, TN 11-03-2008 og MeN 25-03-2008. Heimild til at fremja og fíggja tær í málinum tilmæltu upphæddirnar á Kr 6.437.722,- fyriliggur, tá ið málið er samtykt av býráðnum í tveimum umførum.

Býráðsins samtykt:

Broytingaruppskot frá HAB, um at beina málið aftur í nevnd, fall við 2 atkv. fyri (HAB og KEZ) og 5 ímóti (EA, KFO, ASJ, GvK og SOJ). Broytingaruppskot frá KEZ, um at játta tær uppskotnu 6,4 mió. kr, og at upphæddin verður funnin innan fyri verandi fíggjarkarm við flytingum millum kontur, sum verða útgreinaðar í komandi umfari, fall við 2 atkv. fyri (KEZ og HAB) og 6 ímóti (EA, KFO, ASJ, RN, JH og SOJ).

Tilmælið frá FíN varð síðan samtykt við 7 atkv. fyri (EA, KFO, GvK, JH, RN og SOJ) og 4 ímóti (KEZ, HAB, TJL og SVJ).

27.

2007-19-080 Sáttmálauppskot um sjálvbodna kommunusamanlegging – Svínoyar Kommuna

Á býráðsfundi 3. juli 2007 varð málið um sjálvbodna komm-unusamanlegging við Svínoyar Kommunu tikið til eftirtektar av býráðnum.

Á fundi tann 15. des. 2007 hevur Svínoyar Kommuna staðfest fólkaatkvøðuna um samanlegging við Klaksvíkar Kommunu.

Uppskot til sáttmála er sent Innlendismálaráðnum til kunningar og góðkenningar.

Innlendismálaráðið hevur ongar viðmerkingar til sáttmálan.

Vísandi til omanfyristandandi og tilfarið í málinum annars verður málið við hesum lagt fyri býráðið til endaliga samtykt.

Býráðsins samtykt:

Samtykt at taka undir við sáttmálanum